Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

## Ein djørv avgerð

### *Oddagrein*

FORKVINNURNAR í Heimahjálparafelagnum og Sjúkrasystrafelagnum átala hvassliga, at landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum hevur avgjørt at leggja Almanna- og Heilsuskúlan á Tvøroyri. Tað eru ikki hissini orð, sum tær brúka: Skúlin fer at »detta niðurfyri«. Avgerðin er »mønustingurin hjá útbúgvingini«. Og harafturat liggur skúlin »óhøgliga fyri á Tvøroyri«.

TORBJØRN Jacobsen hevur avgjørt at broyta avgerðina at leggja skúlan í Havn og ístaðin leggja skúlan í Suðuroynni fyri m.a. at vísa, at landsstýrið meinar nakað við ætlanini um økismenning. Um tað er rætt at leggja skúlan í Suðuroy, ella um avgerðin er í stríð við gjørdar avtalur, skal ikki takast støða til her. Hinvegin skal hetta skiljast sum nakrar prinsipiellar viðmerkingar.

TAÐ er at fegnast um, at ein landsstýrismaður, ella eitt aðalstýri, torir at ganga ímóti gongdini, at alt skal flytast til Havnar, og ístaðin leggja ein stovn ella ein skúla aðrastaðni enn í høvuðsstaðnum. Skal nakað ítøkiligt spyrjast burtur úr føgru orðunum um økismenning ella útoyggjamenning, so er neyðugt at taka slík stig. Havnarfólk, stovnsleiðarar, ella fakfelagsleiðarar sum í hesum føri, fara helst at mótmæla og leggja fótonglar. Men slíkum má ein landsstýrismaður ikki lata sær lynda.

FRAMMANUNDAN hava vit skúlar og útbúgvingar uttan fyri Havnina. T.d. hava vit bæði kokkaskúla, sjómansskúla og húsarhaldsskúla í Klaksvík. Í Vestmanna hava vit fiskivinnuskúla. Tí duga fólk ikki at skilja, hví ein almanna og heilsuskúli ikki kann leggjast í Suðuroy.

UMBERINGIN, at talan er um tilkomin fólk, dugir ikki. Tað eru so nógv tilkomin fólk, sum mugu leita sær burtur at fáa sær útbúgvingar ella eftirútbúgvingar. At tey, sum skulu á skúlan, skulu verða noydd at leiga sær eini hús, er heldur ongin umbering. Tað ber líka so væl til at byggja hús til fólk í útbúgving í Suðuroy ella í Vágum sum í Havn. Tað er frálíkt, at føroyingar – ung sum tilkomin – eisini læra ein annan part í landinum at kenna.

AT siga, at ein skúli liggur óhøgliga fyri á Tvøroyri – einum høvuðsplássi í landinum – er næstan at ásanna, at viðkomandi er ikki »gearað« at búgva í einum oyggjasamfelag. Landsstýrismaðurin hevur tikið eina djarva avgerð, sum mong geva honum eitt herðaklapp fyri.

*Sosialurin*

# Føroyingar skikka sær betur

*Sambært frágreiðingini hjá Ríkisumboðnum eru føroyingar minni kriminellir nú enn fyri sjey árum síðani*

STEFAN Í SKORINI

Í 1993 vórðu 1.760 brot framd á revsilógina, meðan talið í fjør varð komið niður á 1.064, og tað hevur ligið harum tey seinastu trý árini. Frá 1993 til 1994 var eitt stórt fall í brotum á revsilógina, og síðani er tað minkað so líðandi.

**Færri í geglið**
Talið av fólki, sum hava verið í geglinum í styttri ella longri tíð, er eisini minkað. Í 1993 vórðu 167 fólk varðhaldsfongslað ella sótu dómin av, meðan í fjør var talið komið niður á 124 fólk, sum máttu í brummuna.

Samlaða talið av døgum, sum fólk hava sitið inni, er eisini fallið saman við fallinum í brotum á revsilógina. Í 1993 sótu fólk í geglinum í heili 4.300 dagar tilsamans. Síðani tá er ein støðug minking farin fram, og í fjør var talið minkað næstan niður í eina helvt.

Eisini talið av fólki, sum eru sett í varðhald, er minkað munandi seinastu árini. 504 persónar høvdu í 1993 skikkað sær so illa, at løgreglan mátti taka tey í varðhaldið. Hetta tal er í 1999 fallið niður á 296.

Fútamálini eru eisini vorðin færri, tí at í árinum 1993 vóru 3.565 fútamál, meðan 2.328 vóru í fjør.

Úrskurðurin av hesum er, at løgreglan hevur ikki havt eins nógv at gera í fjør sum í 1993.

**Fleiri útrend og færri koyra full**
Hóast minkingarnar á øðrum økjum, so vóru fleiri útrend ella útrykningar í fjør enn í 1993. Tey fyrst árini eftir 1993 var ein lítil minking í talinum av útrendum, men síðani er ein stórur vøkstur farin fram.

Í 1993 var talið av útrendum 2997, og eingin stórvegis broyting var fram til 1998, tá ið løgreglan hevði heili 4.597 útrend, sum aftur er økt í 1999.

Brotini á ferðslulógina eru eisini vorðin færri. Í 1993 vóru 2.226 skuldsett fyri brot á ferðslulógina, tá ið rúsdrekkakoyring og parkeringsmál ikki eru tikin við. Í fjør var talan um 1.801 skuldsetingar, men talið var lægst í 1997, tá ið 1.336 vórðu skuldsett fyri brot á ferðslulógina.

Í fjør vórðu 127 fólk tikin fyri rúsdrekkakoyring, meðan talið var uppi á 199 í 1993. Í 1997 var talið sera lágt, tá løgreglan bara tók 10 fólk fyri at verða rúsað, meðan tey koyrdu.

Í 1993 vórðu 2,2 milliónir krónur goldnar í bótum. Lægst var upphæddin í 1997, tá hon var 1,3 milliónir, meðan vit í fjør skuldu av við 1,6 milliónir. Talið av bótum er eisini minkað. Í 1993 vórðu 2.831 bøtur givnar, meðan talið var 2.086 í fjør.



*Færri føroyingar sótu í brummuni í fjør enn í 1993*

# Stovna Linux brúkarafelag í Føroyum

*Linux brúkarafeløg eru um allan heimin, og nú verður eisini møguleiki hjá føroyingum at gerast limir í einum slíkum felag*

STEFAN Í SKORINI

Linux er eitt telduforrit, sum øll kunnu ogna sær uttan at gjalda eitt oyra afturfyri, og harafturat er Linux eins gott og tey kendu forritini sum Windows, ið kosta brúkaranum nógvan pening.

Ein annar fyrimunur við Linux er eisini, at forritið verður betri allatíðina, tí at brúkararnir sjálvir koma við betringum til forritið, sum teir síðani leggja út á internetið.

Maðurin, sum gjørdi tað fyrsta Linux forritið, vildi fegin hava hjálp frá øðrum, og nú verður forritið betrað so hvørt, so tað ber til at taka eitt nýtt Linux forrit niður av internetinum annað hvønn mánað.

Jacob Sparre Andersen er ein teirra, sum hevur tikið stig til at stovna eitt føroyskt brúkarafelag, og hann sigur, at Linux er meira álítandi enn Windows, sum oftari brýtur saman.

Vansin við Linux er kanska, at tað verður ikki hildið at verða so væl nýtiligt til heimabrúk. Tað er tó ofta upp til hvønn einstakan, hvat honum dámar betri, sigur Jacob Sparre Andersen, sum er edv-maður á kjarnorkuroyndarstøðini í Risø á Sjællandi, har Linux eisini verður brúkt.

**Nógv brúkt**
Linux er eitt nógv brúkt forrit, og tí eru brúkarafeløg kring heimin. Ætlanin við einum brúkarafelag er, at limirnir kunnu hjálpa hvørjum øðrum við at brúka Linux, tí teir hava onga aðrastaðni at venda sær fyri at fáa hjálp.

Linux verður nógv brúkt av stórum fyritøkum og hægri lærustovnum, og tey spara nógvan pening við at brúka Linux. T.d. kann nevnast, at Niels Bohr Instituttið sparir 800.000 krónur árliga við at brúka Linux ístaðin fyri Windows. Almenna umsitingin í Føroyum kundi spart nógvan pening við at skift til Linux.

Studentaskúlin í Hoydølum hevur eisini ætlanir um at gera eitt Linux laboratorium á skúlanum, sum næmingarnir kunnu arbeiða við.

**Føroyskt brúkarafelag**
Í dag verður eitt Linux brúkarafelag sett á stovn í Føroyum, og endamálið er at geva fleiri føroyingum møguleikan at brúka Linux og samstundis hava eitt føroyskt brúkarafelag at ráðføra seg við viðvíkjandi trupulleikum.

Jacob Sparre Andersen skal verða við á stovnandi fundinum í dag, sum verður fyri innboðin, og hann er limur í einum Linux brúkarafelag á Sjællandi, ið er eitt tað størsta brúkarafelagið í heiminum, sum hevur upp ímóti 6000 limir. Jacob skal m.a. greiða eitt sindur frá, hvat tey gera í felagnum í Danmark.



# Skal vera nógv tryggari at liggja við kei í Hvalba

*Nú verður farið undir eitt umfatandi arbeiðið at dýpa havnina í Hvalba. Arbeiðið væntast at kosta einar fýra milliónir*

ÁKI BERTHOLDSEN

**Hvalba:** Mánadagin verður væntandi farið undir arbeiðið at dýpa havnina í Hvalba.

Arbeiðið fer at vara í nakrar mánaðir og tað fer helst at kosta einar fýra milliónir krónur.

Tað er byggifelagið J&K Petersen, sum skal gera arbeiðið.

Tað er nakað síðani, at Borarin úr Skopum kom suður. Hann hevur ligið við bryggju í Havn síðani, men arbeiðið at dýpa havnina byrjar ikki fyrrenn nú, eftir at summarfrítíðin er av.

– Ætlanin er at dýpa tað mesta av havnina niður á sjey metrar á miðal vatni, sigur Niels Jacob Thomsen, bygdaráðslimur í Hvalba.

Í bygdaráðnum er tað serliga hann, sum hevur arbeitt við málinum, og hann sigur, at hetta verður ein stórur bati, bæði hjá skipum, hjá sjómonnum og hjá flakavirkinum, øll hava so ómetaligan stóran týdning fyri kommununa

Í løtuni er havnin fimm metrar djúp á miðal vatni, so ætlanin er at dýpa hana tveir metrar.

Annars er grivið niður á hellu, men hon skal nú spreingjast burtur, men afturfyri verður tað so neyðugt at spenna upp undir aftur bryggjukantin.

**Sera tvørligt**
Niels Jacob Thomsen sigur, at tað hevur í nógv ár verið eitt ynski, at havnin varð gjørd djúpari.

–Tað hevur verið sera tvørligt, at hon hevur verið so grunn.

–Tað er bert í hendinga góðum líkindum, at tveir bátar kunnu liggja við bryggju ísenn, og tá skulu teir ikki vera ov stórir heldur.

Annars kunnu tveir bátar liggja uttan á hvørjum øðrum, men tað er heldur ikki tann besta loysnin.

–Skulu fleiri bátar, hevur tað tískil verið neyðugt at flyta bátarnar, so hvørt, teir hava aveitt,

– Annars hevur manningin verið noydd at flyta bátin, tá ið liðugt er at avreiða.

Oftast verður farið á Tvøroyri at leggja teir.

– Men hetta er eitt sera óhøgligt hjá manningunum og stjelur nógva frítíð frá teimum. Og tað er óheppið, tí teir hava fáar frídagar frammanundan.

Niels Jacob Thomsen sigur, at tað hevur eisini kostað nógv arbeiði á flakavirkinum, at havnin hevur verið so grunn.

–Flakavirkið hevur ikki kunnað keypt tann fisk, teir hava viljað keypt, tí havnin er so grunn, at nógvir av teimum størru skipunum hætta sær ikki at leggja at.

–Annars hevur tað ikki verið óvanligt, at bátarnir hava lagt fiskin upp á Tvøroyri, og so er hann blivin koyrdur norður til flakavirkið í Hvalba.

– Men so skal tann virkaði fiskurin aftur koyrast upp á Tvøroyri, tá ið hann skal avskipast.

Hann sigur, at hetta hevur verið sera kostnaðarmikið hjá flakavirkinum og hevur gjørt teirra kappingarstøðu verri.

– Tá ið Havnin er gjørd djúpari, kunnu trý skip liggja við bryggju ísenn.

– Og verður tann seinasti parturin av havnini eisini gjørdur djúpari, kunnu fýra bátar liggja við bryggju ísenn.

– Men tað verður ikki í hesum umfari, sigur Niels Jacob Thomsen.



*Borarin úr Skopun hevur ligið til reiðar í Hvalba í fleiri vikur. Men mánadagin erætlanin at fara undir arbeiðið at dýpa havnina og tað verður ein stórt framstig*

# Taka sambýlið í nýtslu fyrsta dagin

*Tað verður eitt sindur dýrari, enn upprunaliga mett*

ÁKI BERTHOLDSEN

**Hvalba:** Tað er nú komið so mikið áleiðis at gera eldrasambýlið í Hvalba, at tað nú verður tikið í nýtslu heilt skjótt.

Niels Jacob Thomsen, bygdaráðslimur, sigur, at gongst sum ætlað við tí, sum er eftir at gera, verður tað tikið nýtslu nú 1. sept.

Í eldrasambýlinum er pláss fyri 10 fólkum, men tað skilst, at ætlanin er at hava átta fólk skulu búgva í sambýlinum, og so skulu hini bæði plássini verða til umlætting.

Sambýlið verður gjørt í einum húsum, sum bygdaráðið nakað síðani keypti til endamálið.

Húsini eru í trimum hæddum og tað var neyðugt at gera nokk so fitt við tey, áðrenn tey kundu brúkast til endamálið. Eitt nú skuldi lyfta setast upp og bara hon kostar fleiri hundrað túsund.

Men Niels Jacob Thomsen sigur, at tá ið húsið er liðugt, er tað væl egnað til endamálið, tí kømurini eru stór og ljós og útsýnið er av tí allarbesta útyvir alla bygdina og út á fjørðin. Somuleiðis skulu parkeringspláss gerast frammanfyri húsið.

Tá ið eldrasambýlið er liðugt, kostaði tað eitt sindur meiri, enn upprunaliga mett.

Tað fer at kosta umleið 2,5 milliónir, tá ið tað er liðugt og tað heldur hann avgjørt er á góðari leið fyri eitt slíkt hús.

Sjálvt húsið kostaði bygdaráðnum 1 millión at keypa, so tað er brúkt 1,5 millión upp á tað afturat, sigur Niels Jacob Thomsen.



*Eldrasambýlið í Hvalba verður ætlandi tikið í nýtslu 1. september og ta- kostar umleið 2,5 milliónir*

